# Tveir næmingar í 1. flokk

**Í Sandvík vóru tað bara hesir báðir dreingirnir, sum byrjaðu í 1. flokki mánadagin**

FYRSTI SKÚLADAGUR
*Áki Bertholdsen*

Mánadagin var ein stórur dagur í lívinum hjá 748 børnum í Føroyum. Hetta var teirra fyrsti skúladagur og tað er ein varði av teimum heilt stóru í lívinum.

Men stórur munur er á skúlunum. Í sjónvarpinum vitjaðu tey í Hoyvíkar skúla, har yvir 70 børn byrjaðu í 1. flokki.

Í hinum endanum á skalanum er lítli bygdarskúlin í Sandvík. Har byrjaðu bara tveir drongir í 1. flokki.

Men Eyðfinnur og Tórður vóru akkurát líka spentir sum øll hini børnini, tá ið teir hildu leiðina niðan í skúlan við spildurnýggjari tasku á bakinum og í nýggjari, bundnari troyggju, sum vanligt er har um leiðir.

Fyrsta dagin í skúlanum hendi kortini ikki nakað serligt. Lærarin beyð teimum vælkomnum og vístu teimum runt á skúlanum.

Tey fingu tímatalvuna og eina músamáttu frá Kræftens Bekæmpelse.

Men teir eu báðir samdir um, at tað besta var, at teir sluppu at spæla við teldu eina løtu ímeðan hini tosaðu.



*Hetta er ein av landsins minstu fyrstu flokkum. Tórður Thomsen, vinstrumegin og Eyðfinnur Jensen, vóru einastu næmingar, sum byrjaðu í 1. flokki í Sandvík í ár*

Men tá ið teir skuldu í skúla í gjár, var tað álvari. Tá fingu teir onkrar bøkur og sluppu eisini at royna seg við smávegis lesing og skriving, men ikki varð lagt hart út kortini og fríkorterini vóru í longra lagi fyri at samansjóða børnini í skúlanum.

Skúlabørn í Sandvík hava eina umskiftiliga tilveru tí tey ganga í ikki færri enn trimum skúlunum, áðrenn tey standa við 10. floks prógvinum í hondini.

Sandvíkar skúli er ein tann minsti í landinum. Í løtuni ganga bara sjey børn í skúla. Børnini ganga í skúla í Sandvbík í fimm ár, so fara tey í skúlan í grannabygdini, Hvalba har tey ganga til og við 9. flokk og 10. flokk taka tey so á Tvøroyri.

Skúlin í Sandvík hevur havt ringar umstøður, men hann er nú bygdur út og hevur fingið tvær skúlastovur afturat, so nú eru umstøðurnar munandi betri.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin fleyr til gul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartil upp í stívt andøvsgul av útsynningi og regn av og á. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Um middagsleitið gul av ymsum ættum, men um kvøldið hvassur vindur av útnyrðingi og ælingur. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útnyrðingi og ælingur. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, sunnudagin mest av landsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 16 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | 21 |
| Halifax | 17 |
| Reykjavík | – |
| Seyðisfjørður | 12 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 24 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 31 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 34 |
| Malorca | 36 |
| Athen | 33 |
| Malta | 35 |
| Tunis | 39 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 13 |
| New York | 25 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 998 hPa. við Føroyar fer skjótt eystureftir. Eitt annað lágtrýst, 1007 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing eystan og dýpist.




Lágtrýstið vestan fyri Skotland kemur móti Føroyum og dýpist. Tað gevur væntandi nógvan vind av útnyrðingi fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/08 kl. 06⁰⁰– 19/08 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,1°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 18/08 kl. 06⁰⁰–19/08 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 35,0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

19. august: Mánin longst frá jørðini
20. august: Seinna kvarter

Kelda: Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. aug | 01.11 | 13.45 | 00.11 | 12.45 | 00.26 | 13.00 | 03.11 | 15.45 | 04.11 | 16.45 | — | 12.00 | 11.00 | 23.34 | 01.26 | 14.00 | 02.26 | 15.00 | 00.56 | 13.30 | 02.11 | 14.45 |
| 21. aug | 02.19 | 14.54 | 01.19 | 13.54 | 01.34 | 14.09 | 04.19 | 16.54 | 05.19 | 17.54 | 00.34 | 13.09 | — | 12.09 | 02.34 | 15.09 | 03.34 | 16.09 | 02.04 | 14.39 | 03.19 | 15.54 |
| 22. aug | 03.16 | 15.38 | 02.16 | 14.38 | 02.31 | 14.53 | 05.16 | 17.38 | 06.16 | 18.38 | 01.31 | 13.53 | 00.31 | 12.53 | 03.31 | 15.53 | 04.31 | 16.53 | 03.01 | 15.23 | 04.16 | 16.38 |
| 23. aug | 04.01 | 16.24 | 03.01 | 15.24 | 03.16 | 15.39 | 06.01 | 18.24 | 07.01 | 19.24 | 02.16 | 14.39 | 01.16 | 13.39 | 04.16 | 16.39 | 05.16 | 17.39 | 03.46 | 16.09 | 05.01 | 17.24 |

5 707265 100036 >